# Politikkur viðvíkjandi áhugamálsósemjum

**Hesin politikkur hevur til endamáls at fyribyrgja, at kundar í Betri hava tap orsakað av áhugamálsósemjum millum kunda og Betri ella starvsfólk hjá Betri**

Politikkurin lýsir tær áhugamálsósemjur, sum Betri metir kunnu stinga seg upp í sam bandi við íløgutænastur, ið Betri veitir kundum sínum. Politikkurin lýsir eisini, hvussu bankin handfer áhugamálsósemjur við at skipa fyri fyribyrgjandi leiðreglum og virkisgongdum.
Í minsta lagi eina ferð um árið metir Betri, um politikkurin er nøktandi, ella um møguligar nýggjar áhugamálsósemjur skulu leggjast afturat politikkinum. Betri metir regluliga, um tær leiðreglur og virkisgongdir, ið eru partur av hesum politikki, eru nøktandi.

## ÁHUGAMÁLSÓSEMJUR

Betri hevur eyðmerkt týðandi viðurskifti, sum eru ella kunnu vera atvold til áhugamálsósemjur, ið kunnu vera til bága fyri eitt ella fleiri av áhuga málum kundans:

- um Betri hevur annað áhugamál enn kundin í sambandi við ta tænastu, sum verður veitt kundanum
- um Betri antin hevur eina fíggjarliga ella aðra orsøk til at velja áhugamál hjá einum ávísum kunda ella kundabólki fram um áhugamálini hjá einum øðrum kunda ella kundabólki
- um Betri ger handlar dyri egna rokning og samstundis hevur upplýsingar um, at ein kundi kann væntast at koma við einum handilsordra í sama virðisbrævi
- um Betri fær gjald frá triðjamanni, sum kann enda í áhugamálsósemjum millum Betri og kundar hjá Betri
- um Betri hevur áhuga í íløgu greiningum, sum viðvíkja virðisbrøvum, ið verða bjóðað kundum hjá Betri

## Handfaring av áhugamálsósemjum

Betri hevur gjørt leiðreglur og virkis gongdir til handfaring av eyðmerktum áhugamáls ósemjum. Leiðreglurnar og virkisgongdirnar skulu tryggja:

- at trúnaðarvitan bara verður atkomilig hjá persónum, ið hava ein lógligan tørv til tess
- at kundaupplýsingar ikki verða spjaddar til onnur øki í bankanum enn tey øki, har upplýsingarnar skulu viðgerast
- reglur fyri, hvussu starvsfólk, sum veita íløguráðgeving til kundar hjá Betri, kunnu ogna sær, geva út ella handla fíggjarlig amboð
- at starvsfólk bankans, sum beinleiðis røkja áhugamál bankans og t.d. handla vegna egingoymsluna hjá bankanum, ikki samstundis ráðgeva kundum bankans
- reglur fyri starvsfólk, ið hava persónligan áhuga í íløgugreiningum og útinna íløguráðgeving í virðisbrøvum, ið eru umfatað av greiningini
- at regluligt eftirlit verður gjørt fyri at eftirkanna, at leiðreglur og virkisgongdir verða yvirhildnar

betri

**Betri Banki P/F**
Postboks 34
Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 000
betri@betri.fo
www.betri.fo